4 x útvarp

Birgir Kruse

Ta› er nógv i› bendir á, at Útvarpi› setir tankar og virki í gongd hjá mentafólki her á landi. Og ta› er frálíkt. Her hugsi eg ikki einans um metsølubøkurnar hjá Jógvani Arge. Tær standa sterkar nokk uttan mína umtalu. Nei, her hugsi eg um ymisk onnur mentanarlig avrik, sum fram eru komin seinastu dagarnar. Smæ›in og lítillátin, men kann henda at eitt ver›ur stórverk av alfrø›iligum slagi. Upphavsfólkini eru Ella Smith Clementsen, Marianna Debes Dahl, Jónhe›in Tróndheim og Kári Sverrisson. Øll hava tey fingist vi› útvarp. Vi› útvarpsleikir og ljó›myndir fyri børn og vaksin, teknikari og programmedarbei›ari og hin fjór›i sum lokalur heimsvertur fyri stevi, lagi og ásláttarfrøi, vi› og uttan ›. F‡ra fólk, sum hava ta› til felags, at tey hava gjørt útvarp og eru aktuell á føroyska mentapallinum.

EITT TYSSI AV TONKUM

Hetta er heiti á lítlari bók, sum Ella Smith Clementsen (f.1952) gevur út á egna forlagnum M‡rifípan. Ikki vanlig "skaldsøga", men heldur samansettur tekstur vi› yrkingalíknandi brotum innímillum. Evni›, i› kn‡tir tekstin saman í eitt tyssi av tonkum, er sjúka og óttin fyri dey›a. Søgan sn‡r seg um vinarlagi› millum tvær vinkonur, tá i› álvarslig sjúka kemur uppí. Ta› skínur í›gjøgnum at sumt eru upplivingar, me›an sumt ivaleyst er funni› uppá. Ein roynd, at skriva seg ígjøgnum svára kreppu. Rithøvundurin leggur upp til, at fólk sjálvi mugu taka stø›u til hvussu bókin skal enda. Ta› stendur opi›, um sjúka vinkonan klárar ta›. Ella Smith Clementsen vil lata vónina liva allan vegin. Bakgrundina til bókina finna vit í ljó›mynd í Útvarpi Føroya vi› sama heiti "Eitt tyssi av tonkum", har Jóhannus á Rógvu gjørdi tónleikin, leg›i til rættis og tók upp. Sjónleikararnir Elin K. Mouritsen og Nora Bærentsen lósu tekstin í ljó›myndini, sum var› send langa fríggjadag. Bókin, sum telur 61 bla›sí›ur, er solei›is ljó›myndin, sum nú er komin á prent. Ella fekk í 1994 barnabókahei›ursløn Tórshavnar B‡rá›s. Umframt at hava t‡tt hópin av bókum, hevur hon skriva› eina rø›a av jólasøgum, eisini til útvarp og sjónvarp.

ME‹AN LØTUR LÍ‹A

Hetta er heiti á fyrstu bók í eini rø›, sum Marianna Debes Dahl (f.1947) er farin undir og forlagi› Fannir gveur út. Vi› práti um gerandisvi›urskifti sum botni, hevur hon hitt tjúgu fólk runt um í landinum. Ta› serstaka vi› hesum samrø›um er, at heimildarfólkini eru so tilkomin. Práti› er so at siga gjørt í evstu løtu. Heimildarfólkini eru fødd í tí›arskei›num 1906 - 1924. Henda fyrsta bókin í rø›ini er útskrift av nýggju útvarpssendingum, sum høvundurin á›ur hevur gjørt og sum sendar eru í Útvarpi Føroya. Tilsamans gjørdi Marianna 28 útvarpssendingar yvir henda sama leist. Í bókini eru 40 myndir, sum aloftast vísa heimildarfólkini á barnaárum. Umframt at gera útvarpssendingar, hevur Marianna skriva› hópin av bókum, bæ›i til børn, ung og vaksin. Nakrar av søgum hennara eru eisini komnar út á ø›rum málum, eitt nú donskum, svenskum og enskum. Í 1978 fekk hon barnabókahei›ursløn Tórshavnar B‡rá›s fyri "Burtur á hei›i".

KRISTMESSA

Hetta er heiti› á fløgu, sum Jónhe›in Tróndheim (f.1966) gevur út á Heimamissiónsforlagnum vi› stu›li frá teldufyritøkuni Formula Føroyar. Jónhe›in sigur sjálvur, at útgávan er ein roynd at eftirgera ein klang frá barnaárum, tá jól vóru í hondum. Tá var plátuspælarin snúningsásurin, í dag er ta› fløgan og fløguspælarin. Tí hesa dagførdu útgávu. Tí í veruleikanum er søgan gomul. Tann søgan, sum fjalir seg í jólaevangeliinum. Í nýggju pettum hevur Jónhe›in fingi› Henry D. Joensen at lesa annan kapitul hjá Lukasi. Ímillum er urguleikur og sálmasangur. Og urgan er ikki gamla, heimliga Philichorda, men urgan í Fuglafjar›ar kirkju vi› hennara seregna klangi. Max Højgaard er ta›, i› tre›ur hana, me›an Leila Højgaard syngur sálmarnar, sum hoyra jólunum til. Fyrst Brorson-sálmin Mítt hjarta tilhald hevur, sum Axel Tórgar› t‡ddi. Og nú vit tóku stevi› í Útvarpinum, so er vert at gáa um, at júst hann var fyrsti útvarpsstjórin, Axel. Av ø›rum skreytum í hesari fløgu er vert at nevna, at listama›urin Ingálvur av Reyni medvirkar í sálminum Eg rósu upp sá næla. Sum heiti bendir á, er hetta ein messa vi› inngangsbøn og útgangsbøn, preludium og postludium. So nú kann ein fara til jólamessu – á fløgu og alt ári›.

NINA, NINA, NÁI

Hetta er heiti› á tvífløgu, sum Kári Sverrisson (f. 1971) gevur út á plátufelagnum Tutl. Tvífløgan fevnir um ikki færri enn 145 skeringar. Men veri› bara sinnilig; hvør einstøk skering er stutt, í flestu førum ørstutt. Kári, sum í hesum føri má metast sum granskari, hevur veri› á Fró›skaparsetrinum og leita í tí savni, har er vi› ljó›upptøkum av si›søguligum slagi. Heilt nágreiniliga tí partinum av føroyska sanginum, vit rópa skjaldur, ramsur og vísur. Haraftur at hevur hann eisini gjørt upptøkur sjálvur. Tá eg fekk fløguna upp í hondina, leita›i eg beint til ljó›upptøkurnar vi› føroyskum ljó›førum. Jú rætt er, føroyskum ljó›førum. Her er ikki talan um Stratovarius hjá Eriki, men um gásafjø›ur, fja›urlás, látipípu, snurru og græsstrá. Úti undir Gu›s opna føroyska himni. Og beint innan rendi eg meg í eina skering vi› Bjarna Mohr (1912-1988), sum í eini upptøku frá 1969 kvø›ur "Húgvutátt". Ljósklárur stendur Ei›isskúli fyri mær og pallurin í tá n‡ggju fimleikarhøllini, har øll stó›u á ra›. Vevkonur, fjallmenn og sey›amenn. Kanska gera tey ta› enn. Ársins húgvu-show. Teksturin til táttin er prenta›ur og allir smálutir kring upptøkuna. Skilji, at svenska Birgitta Hylin sála hevur gjørt júst hesa upptøku í Havn hin 2. mai hetta ári›. Tøkk fái hon fyri ta›. Og Kári fyri savningararbei›i, sum byrja›i vi› útgávuni "Flúgvandi bi›il" fyri trimum árum sí›ani. Skilji, á útgevaranum, at hann longu er farin undir tri›ju útgávuna. Hesin arbei›sháttur at savna si›søguligt, vir›ismiki› tilfar og geva ta› út á fløgu vi› teksti og nágreiniligum upp‡sing er ein sjálvsøgd mentanaruppgáva. Eitt nú í Svøríki. Har hevur plátufelagi› MNW givi› út savni› "Föregångare" (1993), sum tekur stø›i í fólkatónleikarasavninum hjá svenska útvarpinum. Sum yvirskriftin bendir á, so er ta› ikki einans Fró›skaparsetri›, men sanniliga eisini upptøkusavn Útvarpsins, i› her hevur áhuga. "Nina, nina, nái" og virksemi hjá Kára og bólkinum Enekk er so stórt arbei›i, at kønur ummælari eigur at vi›gera hetta verk burturav, tá jólini eru farin aftur um bak.

Nú eisini Axel Tórgar› er aktuellur vi› ikki færri enn trimum Shakespeare-t‡›ingum er hóskiligt at leita fram or› útvarpsstjórans í innganginum til "Morgunlestrar" Tórgar›s, sum komu í 1987: "Me›an Axel hevur skriva›, hevur Útvarpi› savna› sanguppløkur av allari sálmabókini, og solei›is hevur alt veri› hond í hond at gera lurtararnar kunnugar vi› øll sálmaløgini í okkara ungu sálmabók. Axel hevur broti› upp úr n‡ggjum, og mong eru tey, sum hava ynskt sær at átt hansara morgunlestrar. Nú fáa tey teir". Solei›is skriva›i Niels Juel Arge táverandi útvarpsstjóri. Eitt frálíkt mentunars‡ni. Hond í hond.



Kári Sverrisson syngur fyri børnum

Jólatrøll

Stjørnurnar vísa veg
Líkst inn í handlarnar

»Eg skal hava eini kynsliga
Eggjandi undirklæ›i:
Einar langsokkar vi› lykkjum
Og einar brósthaldarar stødd ›-skál
Alt í rey›um liti«
Seg›i málføringurin vi› krambakvinnuna
»Vit eiga bara c-skálir eftir«
Svara›i hon

Stjørnurnar vísa veg
Til ta seinastu jólaveitsluna
Dagin eftir vakna›i hann
Sum ein nakin fjølrita› reyv

Oddfrí›ur Marni Rasmussen

Gandur her og handan

Carl Johan Jensen ummælir:

Joanne Rowlings: »Harry Potter og Vitramannasteinurin« Gunnar Hoydal t‡ddi Bókadeild Føroya Lærarafelags

Helst eru ta› fá bókmentaverk, i› fáa so brá›a og alfólkaliga undirtøku so vítt um heimsins lond, sum bókarø›in hjá enska rithøvundanum Joanne Rowlings, um gandaskúlanæmingin Harry Potter. Og sum vera man ver›ur nógv gitt um, hvussu ta› kann bera til, at lesarar – og ikki bara teir sum bøkurnar eru mi›a›ar eftir og ætla›ar til, børn og ung, nei eisini tilkomnir lesarar – mest sum falla í burturrykking uppi yvir hesum søgunum, á hvørjum máli tær so koma út. Tí teir tíggja› sær, sum vóru teir trøllbundnir, ja hetta minnir ikki sørt um Bitlaø›ina, sum leyp í ungdómin í tr‡ssunum, so stórt er komersi› um bøkurnar. Hvørja fer› ein n‡ggj Potterbók kemur í bókabú›irnar umgongst ikki, at høvundurin gerst umrø›uevni í vir›iligum kjaksendingum á vir›iligum sjónvarpsstø›um, har bert vir›iligt álvarsfólk sleppur framat, i› sjáldan vir›ir anna› or› enn ta›, sum hevur vi› vir›iligar spurningar at gera sum búskap og millumlandavi›urskifti. Í vir›iligum blø›um royna vir›iligir ritstjórar somulei›is, ja enntá bla›stjórar vi›, at loysa gátuna um Potterfyribrigdi› og huglei›a í vir›iligum oddagreinum um, hvørji tey gandará› eru, sum hava dára› teir so at teir rúka í teldurnar at kunngera fyri høgum og lágum, hvat teir halda um eitt evni, sum upp á seg, sjálvandi, einki hevur upp á seg. Ummælarar í vir›iligum tí›arritum og dagblø›um, bera høvundin saman vi› kendar og klassiskar barnabókahøvundar sum Lewis Carrol (hann i› skriva›i Alice í undralandi), Roald Dahl o.fl. Men hvat, i› ta›, námt sagt, er, sum ger gandin í Harry Potterbókunum, i› tryllir børn sum hálvvaksin í øllum hera›shornum, ta› eru flest á ójøvnum máli um. Men eitt er vist og ta› er, at hesar bøkurnar sláa sum er øll sølumet, so fjølmi›laáhugin man valla fara at minka enn um sinn.

Nú hevur Bókadeild Føroya Lærarafelags givi› út fyrstu bókina í Harry Potterrø›ini Harry Potter and the Philosopher´s stone í føroyskari t‡›ing. T‡›ingina, i› ber heiti› Harry Potter og vitramannasteinurin, hevur Gunnar Hoydal gjørt. Harry Potter og Vitramannasteinurin er ein bók, sum breg›ur aftur í hevdbundna frásøgn bæ›i so og so, men høvundurin dugir at brúka gomul pret í frásagnarlistini á hegnisligan og einskila›an hátt. Joanne Rowlings veit út í odd og egg, hvat i› ein gó› søga er og hvussu hon skal sigast. Hon evnar til eina fjølbroytta og krevjandi søgutilgongd, i› kortini er fast skipa› og grei› vi› ongum óney›ugum slankum og burturvikum. Søgan um Harry Potter og vitramannasteinin er bygd upp sum ein spennisøga, i› fer fram í einum heimi, sum í senn er handan okkara og mitt í honum eins og heimurin hjá teimum fornisku er í søgnum okkara og ævint‡rum. Søguheimurin í bókini, Hogwarts skúli fyri gandakynstur og galdralist, er í mongum upp á skjøns vi› hesumeginheimin. Hesumeginheimurin er eftir l‡singini hjá Joanne Rowlings, ein skynsemisborin betriborgaraheimur, sum stundar eftir reglusemi, eftir at gera seg so streymlinja›an og skilvísan sum gjørligt, ja andliga forpilka›an. Tískil er hann líti› móttøkiligur fyri ella bart út ræ›ist og sk‡ggjar ta›, sum er ø›rvísi ella óreglu-skipa›, sum er ófast ella hevur bara ein evarska lítlan misvísning. Henda betriborgara-lyndskan kemur í bókini skilligast fram í Dursley-hjúnunum Vernon og Petuniu og syni teirra, tí hálvb‡tta og illa vanda og spilta Dudley. Tey hata alt, i› eróvanligt. Alt sum kemur á óvart. Til teirra ver›ur Harry Potter sendur at vera ársgamal eftir at foreldrini eru dey› undir sera gátuforum umstø›um. Ta› er tó synd at siga, at Dursley-hjúnini hava hjartarúm fyri dronginum og enn minni húsrúm, tí hann noy›ist øll síni barnaár at búleikast í einum skápi undir loftstrappuni hjá teimum. Dursley hjúnini eru ímyndin av einum serligum slag av hampiligheit, sum er so gudsná›iliga hálvblint, at ta› bara sær helvtina av øllum heimsins skeivleikum – ta helvtina, sum mispr‡›ir hini. Me›an Harry Potter er hjá Dursley fólkunum ver›ur hansara sanna natúr, gandurin, hildin ni›ri vi› øllum rá›um. Harry má harumframt tola bæ›i órætt og mismun í heimi teirra. Dudley, son sín, lata tey sleppa alt og fáa alt, men frá Harry tola tey ikki hálvdrigi› or› og so saftarleys eru tey vi› hann, at tá i› hann fyllir tíggju ár fær hann bert eitt akslatræ og einar gamlar hosur hjá stjúkpápanum í føingardagsgávu.

Søgan í bókini um Harry Potter og vitramannasteinin, er skift sundur í tveir meginpartar. Fyrri parturin er um tí›ina, sum Harry er hjá Dursley fólkunum. Seinni parturin er um lív hansara á gandaskúlanum. Gandaskúlin er ein í mongum og mørgum enskur kostskúlaheimur, har fastleiki og agi rá›a, men har i› rúm eisini er fyri tí óvanliga, tí sum br‡tur frá reglu og skynsemi – ella vi› ø›rum or›um hugflogi og skapan. Í ein ávísan mun kann og er bókin óiva› ætla at ver›a lisin sum ein uppvakstrarsøga. Ein søga um at koma til vits um seg sjálvan sum menniskja.

Ein samanblandingur av royndskygni og ævint‡ri, ey›kennir, sum nevnt, bókina. Men her eru a›rir træ›rir bregda›ir saman enn í teimum sokalla›u ævint‡raskaldsøgunum. Ávirkan frá tí frásagnarstíli, sum sermerkir ta sonevndu magisku realismuna í verkum, sum eitt nú su›uramerikanskir rithøvundar sum Gabriel Garcia Marques lótu úr hondum í tr‡ssunum og hálvfjersunum, men sum vit eisini kenna úr eldri verkum t.d. Meistarin og Margarita, i› russin Michael Bulgakov skriva›i í tretivunum.

Ta› er kortini ikki djúp speki ella søguligar, politiskar og tilverufrø›iligar hugsanir, sum eru drivfjø›urin í skrivingini hjá Joanne Rowlings, men harafturímóti hugurin at siga søgur, søgur sum fanga hugan, fyrst og fremst, tí at tær eru væl sagdar. Hetta sæst eisini aftur málsliga. Máli› hon n‡tur er mi›víst og skilaliga einfalda› ni›ur til ta› at dríva frásøgnina fram, men er ikki fyri tann skyld fátækt ella ke›iligt. Tvørturímóti.

Ta føroysku t‡›ingina hevur Gunnar Hoydal eins og nevnt gjørt. Sum heild haldi eg at henda t‡›ingin er á heilt gó›ari lei›, li›ilig og ikki yvirføroyska›. Tó er hon í stø›um merkt av, at hon helst er gjørd í skundi, tí ymsar lei›iligar gáloysisvillur koma fyri. Eitt nú ver›ur frú Dursley, sum í enska tekstinum ver›ur kalla› aunt Petunia, vi›hvørt nevnd mostir og vi›hvørt fastur. Javnan kemur eisini heldur óhepp›i› or›abrúk fyri. T. d. stendur á bls. 132, at Harry "lá og lurta›i, hvussu Dean og Seamus (tveir skúlafelagar hjá honum) sovna›u burtur". Mó›urmálsor›abókin skilmarkar tiltaki› "at sovna burtur" vi› or›unum: at doyggja, andast, slokna, og ta› man vera dekan og rívan tiki› til her. Fleiri fer›ir er afturbenda fornavni›: seg, sær, sín brúkt á ein hátt, sum ger, at ilt er at vita, hvønn ta› sipar til. Á bls. 143 stendur t.d. hesin setningurin: Harry sveiggja›i bólttrænum at for›a fyri, at gartlan skuldi bróta sær nøsina. Ta› er ikki lætt at vita um ta› er nøsina á Harry ella gartluni, i› meint ver›ur vi›. Summi or› eru skilliga misskilt í enska tesktinum eitt nú merkir or›i› pudding (bls. 93 í upprunatekstinum) yvirhøvur ta› sum eti› ver›ur omaná døgur›a ella desert, men ikki buding (bls. 107 í t‡›ingini), hóast ta› eisini kann hava ta merkingina. Or›i› neck á enskum (bls. 92 í upprunatekstinum) merkir hálsur ikki nakki (bls. 107 í t‡›ingini). Or›i› excitedly kann ey›vita› t‡›ast uppøstur í onkrum høpi, men tá er ta› vi› kynsligum undirtónum, sum eru óvi›komandi her. Or›ingar í upprunatekstinum sum "he asked excitedly" (bls. 113 í upprunatekstinum) áttu at veri› t‡ddar "spurdi hann spentur" ikki uppøstur (bls. 130 í t‡›ingini). At t‡›a l‡singaror›i› shabby n‡tt um ein handil (á bls. 63 í upprunatekstinum) vi› or›inum ni›urundirkomin (bls.72 í t‡›ingini), haldi eg eisini vera ivasamt. Rættari hev›i veri› at sagt eitt nú ónossligur ella okkurt tannvegin. A›rar kiskur í t‡›ingini eru helst somulei›is íkomnar, tí at ov skjótt er fari› um, eitt nú tá i› setningar standa eftir á enskum í t‡›ingini, hóast or›ini eru føroyska›i. Ein or›ing sum I couldn´t help overhearing (bls. 115 í upprunatekstinum) ver›ur t.d. t‡dd: Eg kundi ikki lata vera vi› at hoyra (bls. 132 í t‡›ingini). Or›alag í upprunatekstinum sum the low rolls of thunder that started near midnight (bls. 38) ljó›a í t‡›ingini: toran, sum fór at rulla út móti midnátt (bls. 41). Vi›hvørt ver›ur eisini ligi› á somu or›unum, hóast upprunateksturin ikki gevur høvi til ta› t.d. á bls. 133 har sagnor›ini snapped og hissed í upprunatekstinum bæ›i ver›a t‡dd vi› or›inum físti. Hesir gekkirnir og onnur smábrek og skeivleikar undantiknir, so er henda t‡›ingin hjá Gunnari Hoydal tó yvirhøvur væl brúkilig og serliga dámar mær væl, hvussu samrø›urnar í bókini eru t‡ddar solei›is, at tær eins og í upprunatekstinum eru ein avgerandi táttur í persóns-l‡singunum.

Samanumtiki› haldi eg, at ta› er eitt gott og tiltrongt tiltak hjá Bókadeildini at geva eina slíka bók sum Harry Potter og Vitramannasteinin út á føroyskum og eg vóni, at forlagi› hevur fíggjarligar umstø›ur til at geva alla Harry Potter rø›ina út sum hon er komandi árini.

Teir tríggir høvu›sleikararnir í fyrsta Harry Potter-filminum, sum ver›ur frums‡ndur næstu jól. Teir eru frá vinstru Emma Watson, sum Hermione, Daniel Radcliffe, sum Harry Potter og Rupert Grint sum Ron